LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 9. januar 2025
J.Nr.: LUM-16- 24/23387-15
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

um avgerð hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum at avmarka innlit í verkætlan og navn á ráðgeva

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið helt aftur upplýsingar um eina verkætlan og navnið á einum ráðgeva, tá tað gav klagaranum innlit í eina umsókn í vinnuligar fiskiroyndir.*
*Umboðsmaðurin var samdur við ráðnum í, at upplýsingarnar um verkætlanina kundu undantakast frá innliti.*
*Viðvíkjandi upplýsingini um navn á ráðgeva í verkætlanini hevði ráðið fyrst grundað avgerðina á, at ráðgevin tók seg úr verkætlanini, um navnið varð upplýst, og harvið var stórur vandi fyri týðandi fíggjarligum tapi hjá felagnum. Ráðið vísti í hesum sambandi m.a. á ein starvsklausul hjá viðkomandi. Umboðsmaðurin helt, at hóast ráðgevandi persónurin kundi javnsetast við eitt handilssamband, sum var ein upplýsing, ið eftir ítøkiligari meting kundi verið undantikið innliti, so førdi upplýsingin um starvsklausulin hjá hesum persóni við sær, at tað var ivasamt, hvørt tað var í tráð við endamálið við innlitslógini, at undantak fyri innliti varð givið á hesum grundarlag.*
*Eftir áheitan frá umboðsmanninum kannaði ráðið støðuna hjá ráðgevandi persóninum av nýggjum. Ráðið kom tá til ta niðurstøðu, at navnið hjá viðkomandi var at meta sum ein virkisloynidómur hjá felagnum, tí við at geva innlit í navnið fekst eisini vitan um verkætlanina. Umboðsmaðurin metti, at á hesum grundarlagi var tað rætt, at ráðið við heimild í § 12. stk. 1 nr. 2 í innlitslógini hevði noktað innlit í navnið.*

## 2. Málslýsing

Málið er framhald av LUM 24/17345, har umboðsmaðurin viðgjørdi eina klagu frá Kringvarpi Føroya (KVF) um, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið (ráðið) ikki vildi geva innlit í alt tilfar um A, ið hevði fingið játtað kvotu til vinnuligar fiskiroyndir eftir svartkjafti.

Í niðurstøðu, tann 27. august 2024, bað umboðsmaðurin ráðið taka málið upp til nýggja viðgerð. Samanumtikið varð víst til, at tað ikki var í samsvar við innlitslógina, at ráðið strikaði

upplýsingar uttan eina ítøkiliga meting av, um upplýsingarnar vóru fevndar av ávísari undantøku í innlitslógini. Umboðsmaðurin bað tí ráðið taka málið upp til nýggja viðgerð og gera eina ítøkiliga meting eftir § 12, stk. 1, nr. 2 og stk. 2.

Eftir hetta tók Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið málið upp til nýggja viðgerð, og tann 4. oktober 2024 sendi ráðið KVF soljóðandi avgerð:

## Nýggja avgerðin

> "Vísandi til niðurstøðu frá Løgtingsins Umboðsmanni frá 27. august 2024, og okkara samskifti um tína innlitsumbøn eftir hetta, hevur Ráðið viðgjørt tína umbøn um innlit aftur.
>
> Ráðið hevur viðgjørt tey skjøl, sum innlit áður er latið í, tað vil siga umsókn um kvotu til vinnuligar fiskiroyndir eftir svartkjafti, virkisætlan og svarið uppá umsóknina.
>
> Avgjørt er at lata innlit í nakrar av teimum upplýsingum, sum innlit áður ikki er latið í. Hesar upplýsingar eru markeraðar við gulum í skjølunum, sum eru viðfest.
> Talan er um navn á skipi, sum fiskar kvotuna, samstarvspartar, undir hesum m.a. nøvn á virkjum. Talan er eisini um navni á persóni, sum stendur undir partinum "forskning og udvikling". Ráðið hevur ikki grundarlag fyri at sýta innlit í hesar upplýsingar.
>
> Viðvíkjandi upplýsingum, sum innlit ikki verður latið í, hevur Ráðið hesar viðmerkingar:
>
> Innlit verður ikki latið í upplýsingar um verkætlanina, undir hesum hvat hon snýr seg um, framleiðsluhættir, fíggjarligar upplýsingar um verkætlanina, hvat úrslitið er og kann brúkast til o.s.fr. Upplýsingarnar eru um virkisviðurskifti, og eru fevndar av § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit. Ráðið metir, at um innlit verður latið í upplýsingarnar, verður verkætlanin almenn, og onkur kann nýta hugskot og aðrar upplýsingar til egna framleiðslu og harvið skaða marknaðarmøguleikarnar hjá A. Hetta kann hava við sær ein týðandi fíggjarligan miss fyri A, og grundarlag er tí fyri at sýta innlit vísandi til oman fyri nevndu áseting.
>
> Allar strikaðu upplýsingarnar eru av hesum slagi, burtursæð frá nøvnunum á tveimum persónum, sum standa undir partinum um advisory board.
>
> Ráðið hevur umrøtt hesar upplýsingar (nøvnini) við A aftur, og felagið hevur upplýst, at báðir persónar hava klausular í setanaravtalunum við teirra arbeiðsgevara, sum forðar teimum í at vera almennir í sambandi við menning av tílíkum verkætlanum, sum A arbeiðir við. Teir hava báðir gjørt greitt, at teir trekkja seg úr verkætlanini, um teir verða almennir. Um so verður, kann verkætlanin hjá A ikki gjøgnumførast, men dettur niður fyri, tí teirra vitan og førleikar eru avgerandi fyri verkætlanina.
> Á hesum grundarlagi hevur Ráðið mett, at verkætlanin hjá A dettur niður fyri, um innlit verður latið í hesar upplýsingar, og stórur vandi er sostatt fyri, at A hevur týðandi fíggjarliga miss av, at innlit verður latið. Víst verður aftur til § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit.

Í frágreiðingini til Løgtingsins Umboðsmann upplýsti Ráðið, at innlit varð sýtt í nøvnini, tí tey kunnu geva ábending um, hvat verkætlanin snýr seg um, og hetta kann hava óhepnar avleiðingar fyri menningina av verkætlanini. Ráðið hevur eisini umrøtt grundarlagið fyri hesi niðurstøðu við A. Niðurstøðan er, at tað er møguligt, at hetta eisini kann vera grundarlag fyri at sýta innliti. Hetta krevur tó eina nærri og meira orkukrevjandi kanning av umstøðunum, og tá Ráðið metir fyrru grundgevingina vera nøktandi, verður ikki gjørt meira við málið nú...”

## 3. Klagan

Við skrivi, dagfest 4. oktober 2024, sendi Kringvarp Føroya umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> “Herfyri kærdi eg svar upp á eina innlitsumbøn til Fiskimálaráðið. LUM kom til tað niðurstøðu, at grundgevingarnar hjá Fiskimálaráðnum at strika fleiri nøvn og annað ikki vóru nøktandi og bað ráðið viðgera umbønina av nýggjum. Nú havi eg fingið svar og nakrar útstrikingar eru tiknar burtur.
>
> Men har eru framvegis nøkur nøvn útstrikaði. Grundgevingin er, at tað kann fáa avleiðingar fyri verkætlanina, um nøvnini vera almenn, tí hesir persónar hava klausular í setanaravtalum við teirra núverandi arbeiðsgevara - teir hótta við at taka seg úr verkætlanini, um nøvnini vera nevnd. Henda grundgeving haldi eg ikki kann góðtakast.
>
> Tað kann ikki vera ábyrgdin hjá Fiskimálaráðnum at dylja nøvn hjá fólkum, sum hava brotið ein klausul við sín verandi arbeiðsgevara. Og hevur Fiskimálaráðið kannað eftir, um hetta veruliga stendur í nøkrum setanarsáttmála? Sambært verkætlanini, so eigur virkið eisini longu nú at koyra og tí skuldi tað ikki verið serliga loyniligt longur, hvørki hvør er við ella hvat framleitt verður.
>
> Tískil verður niðanfyri nevnda svar og viðhefta innlit kært til Løgtingsins Umboðsmann.”

## 4. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 7. oktober 2024 varð klagan send Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum til viðmerkingar. Samstundis varð ráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 28. oktober 2024 sendi ráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar um málið og skjølini í málinum :

> “ ...
> *Yvirskipaða gongdin í málinum*

Eftir at Ráðið móttók álit umboðsmansins frá 27. august 2024 um at taka málið upp aftur um at sýta innlit í um upplýsingar í tilfar viðvíkjandi A, vendi Ráðið sær til klagaran fyri at fáa greiðu á, hvørjar upplýsingar hann ynskti viðgjørdar av nýggjum.

Hetta tí Ráðið var í iva um, um áheitan umboðsmansins bert fevndi um allar ávísar upplýsingar, ella um allar strikaðar upplýsingar skuldu viðgerast av nýggjum.

Klagarin svaraði tann 5. september 2024, at hann var áhugaður í øllum útstrikingum í teimum skjølum, sum hann hevði fingið innlit í, og hetta bleiv sostatt grundarlagið fyri viðgerðini hjá Ráðnum.

Ráðið sendi síðani málið til A, … til viðmerkingar tann 9. september 2024. Samskiftið var síðani í nøkrum umførum við … (A, *mín viðm.*) fyri at fáa nóg neyvar upplýsingar. Eftir telefonsamrøðu við … (A, *mín viðm.*) 2. oktober 2024 var málið mett at vera nøktandi upplýst, og avgerð var send klagaranum 4. oktober 2024.

*Viðmerkingar til málið*

Viðvíkjandi avgerð Ráðsins, so hevur Ráðið við nýggju avgerðini latið innlit í upplýsingar, sum innlit áður ikki hevur verið latið í. Hesar upplýsingar eru markeraðar við gulum í teimum skjølum, sum eru send klagaranum saman við avgerðini. Talan er um navn á skipi, virkjum og á einum persóni, sum stendur í skjalinum Forretningsplan, undir partinum ”forskning og udvikling”.

Ráðið hevur hildið fast við at sýta innlit í upplýsingar um verkætlanina, undir hesum hvat hon snýr seg um, framleiðsluhættir, fíggjarligar upplýsingar um verkætlanina, hvat úrslitið er og kann brúkast til o.s.fr. Avgerðin er grundgivin við, at upplýsingarnar eru um virkisviðurskifti, og eru fevndar av § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit. Ráðið metir, at um innlit verður latið í upplýsingarnar, verður verkætlanin almen, og onkur kann nýta hugskot og aðrar upplýsingar til egna framleiðslu og harvið skaða marknaðarmøguleikarnar hjá A. Hetta kann hava við sær ein týðandi fíggjarligan miss fyri A, og grundarlag er tí fyri at sýta innlit vísandi til oman fyri nevndu áseting.

Ráðið hevur, sum er, onki at leggja afturat hesum partinum av avgerðini.

Síðani stendur í avgerðini, at allar strikaðu upplýsingarnar eru av hesum slagi, burtursæð frá nøvnunum á teimum tveimum persónunum, sum standa undir partinum um advisory board. Hetta er møguliga ikki rætt orðað, men tað skal skiljast soleiðis, at grundgevingin omanfyri ikki er galdandi fyri hesar upplýsingar, og hesar mugu tí viðgerast fyri seg.

Viðvíkjandi hesum báðum nøvnum hevði Ráðið upprunaliga ta áskoðan, at talan var um persónar, hvørs førleikar og arbeiðsøkir vóru kend, og ein avdúkan av teimum vildi kunnað avdúka innihaldið í verkætlanini. Hetta er møguliga enn støðan, ... A sigur eisini, at hetta kann vera støðan. Men í tí samskifti, sum hevur verið við ... (A, *mín viðm.*) í sambandi við nýggju viðgerðina av málinum, hevur hann serliga víst á, at báðir persónar hava klausular í setanaravtalunum við teirra arbeiðsgevara, sum forðar teimum í at vera almennir í

> sambandi við menning av tílíkum verkætlanum, sum A arbeiðir við. Teir hava báðir gjørt greitt, at teir trekkja seg úr verkætlanini, um teir verða almennir. Um so verður, kann verkætlanin hjá A ikki gjøgnumførast, men dettur niður fyri, tí teirra vitan og førleikar eru avgerandi fyri verkætlanina.
>
> ...(A, *mín viðm.*) hevur eisini upplýst, at hann upprunaliga ætlaði, at hesir persónar skuldu sita í nevndini fyri verkætlanini, men hetta vildu teir ikki, tí hetta hevði við sær, at teir vóru almennir. Fyri at halda teir duldar, vóru teir ístaðin knýttir at advisory board.
>
> Ráðið var ikki í iva um, at umstøðurnar eru, sum ... (A, *mín viðm.*) greiðir frá, tað vil siga at persónarnir trekkja seg úr verkætlanini, um teir vera almennir. Hetta hevur við sær, at verkætlanin steðgar. Tað hevur tí álvarsamar fíggjarligar avleiðingar fyri verkætlanina, um Ráðið letur innlit í hesar upplýsingar. Ráðið metir tí, at grundarlag er fyri at sýta innlit í hesar upplýsingar vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit.
>
> Viðvíkjandi viðmerkingum klagarans í klaguni skal Ráðið viðmerkja, at Ráðið sýtir ikki innlit í nøvn á persónum fyri at verja hesar persónarnar og teirra klausular við arbeiðsgevarar teirra. Tað eru avleiðingarnar fyri verkætlanina hjá A, sum eru grundarlagið fyri avgerðini.
> ..."

Í frágreiðingini upplýsti ráðið eisini, at tað nú hevði fingið fráboðan frá felagnum um, at tann eini persónurin hevði boðað frá, at innlit kundi latast í hansara navn.

Eftir at ráðið, tann 29. oktober 2024, gav klagaranum innlit í navnið á tí eina persóninum, spurdi umboðsmaðurin klagaran, um hetta broytti nakað við klaguni. Sama dag svaraði KVF:

> "Hetta broytir einki, tí tað er framvegis eingin saklig grund ikki at lata innlit í øll nøvnini. Tað tykir mær sum at ráðið ikki tekur sjálvstøðugar avgerðir, men leggur tað í hendurnar á aktøri, sum er umfataður av umbønini.
>
> Upprunaliga vildi A ikki lata innlit í øll nøvnini, tí persónar vóru umfataðir av kappingarklausulum, sum kundu koma teimum illa við, um nøvnini komu fram. Hetta dugi eg framvegis ikki at síggja um saklig atlit til ikki at lata innlit og um hetta atlit skuldi umfata øll tey útstrikaðu, so skilji eg ikki at tey kunnu lata innlit í eitt navn og ikki hitt. Tískil skilji eg ikki, at hetta seinasta navnið ikki kann upplýsast.
>
> Annars er hetta dømi um, at tað loysir seg hjá aktørum at draga umbønir í langdrag, so tær kanska ikki longur eru aktuellar yvirhøvur. Upprunaliga var innlitsumbønin send Fiskimálaráðnum 24. februar 2024 og nú skriva vit 31. oktober 2024."

Tann 26. november 2024 sendi umboðsmaðurin soljóðandi skriv til ráðið, har ráðið varð biðið um at upplýsa neyvari um, hvørt navnið á viðkomandi kundi avdúka, hvat verkætlanin innihelt:

> "Sum fráboðað, er umboðsmaðurin farin undir endaligu viðgerðina av klagumálinum.

Í hesum sambandi viðgerð umboðsmaðurin m.a. spurningin, um innlit kann latast í navn á ráðgevandi persóni (advisory board).

Av málinum framgongur, at A yvirfyri Fiskivinnu – og samferðsluráðnum hevur upplýst, at starvsviðurskiftini hjá nevnda persóni forða honum at vera almennur í sambandi við menning av tílíkum verkætlanum, sum A arbeiðir við. Eisini hevur viðkomandi gjørt greitt, at hann tekur seg úr verkætlanini, um hansara navn verður alment. Sambært A kann verkætlanin hjá felagnum ikki gjøgnumførast, um hesin tekur seg úr verkætlanini, tí hansara vitan og førleikar eru avgerandi fyri verkætlanina.

Á hesum grundarlagi hevur ráðið mett, at stórur vandi er fyri, at A fær týðandi fíggjarligan miss av, at innlit verður latið í navnið. Víst verður í hesum sambandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit. Ráðið hevur viðmerkt, at tað ikki eru atlit at verju av persóninum og hansara viðurskiftum, at innlit er sýtt í navnið.

Av málsupplýsingunum framgongur eisini, at hildið verður, at navnið á viðkomandi kann avdúka, hvat verkætlanin inniheldur. Sambært ráðnum er hetta tó ikki neyvt kannað.

Sum útgangsstøði metir umboðsmaðurin, at upplýsingar um navn á handilssambondum eru undantikið innliti, um innlit kann føra til týðandi fíggjarligt tap fyri virkið. Men við tað at forðingar í starvsviðurskiftunum hjá persóninum (handilssambandinum) eisini eru nevnd sum ein møgulig forðing fyri, at innlit kann veitast í navnið, metir umboðsmaðurin, at tað er ivasamt at meta um málið uttan atlit til hesar málsupplýsingar. Hetta tí tað er ivasamt um atlit til starvsviðurskiftini hjá viðkomandi av røttum skulu verjast av innlitslógini.

Vísandi til at endamálið við innlitslógini er so stórur opinleiki sum gjørligt, og persónar ikki kunnu avtala seg burturúr innliti eftir innlitislógini, metir umboðsmaðurin, at tað er ivasamt um verandi grundarlag førir við sær, at navnið á viðkomandi er fevnt av undantakinum í § 12, stk. 1. nr. 2.

Ráðið hevur eisini upplýst, at hildið verður, at innlit í navnið kann leiða til innlit í verkætlanina, men ráðið hevur ikki kanna hesi viðurskifti.

Vísandi til ivan um, hvørt grundarlagið fyri fyriliggjandi avgerð hjá ráðnum, er fevnt av undantakinum í § 12, stk. 1 nr. 2, metir umboðsmaðurin, at tað hevur týdning fyri málið, at ráðið eisini kannar og tekur støðu til, um innlit í navnið kann leiða til innlit í verkætlanina.

Umboðsmaðurin fer tí at heita á ráðið at upplýsa hesi viðurskifti neyvari..."

Tann 20. desember 2024 sendi ráðið umboðsmanninum frágreiðing, har greitt varð frá, at framleiðsluhátturin v.m. í verkætlanini hjá A er so mikið serligur og knýttur at fakligu vitanini hjá viðkomandi persóni, at navnið á persóninum er at meta sum ein virkisloynidómur. Ráðið metir, at um tað verður upplýst, at viðkomandi er partur av verkætlanini, so ber til hjá kappingarneytum at finna fram til, hvat og hvussu verður arbeitt við verkætlanini. Um kappingarneytarnir fáa hesa vitan, kunnu teir væntast at brúka hana og virkishugskotið hjá A til egna framleiðslu og harvið taka part av marknaðarstøðuni hjá A, og kann hetta hava við sær

týðandi fíggjarligar avleiðingar fyri A. Samanumtikið metir ráðið tí, at grundarlag er fyri at sýta innlit í navnið hjá viðkomandi vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit.

## 5. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um avmarkaða innlitið, sum Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur latið KVF í sambandi við uppafturtøku av máli um innlit í alt tilfar í málinum hjá A, sum í sambandi við vinnuligar fiskiroyndir hevði fingið játtað 1200 tons av svartkjafti. Víst verður til LUM 24/17345 um viðgerðina av fyrru klaguni.

**Upplýsingar um verkætlanina**
Í nýggju avgerðini frá ráðnum frá 4. okt. 2024 varð sagt, at innlit varð ikki latið í upplýsingar um verkætlanina, undir hesum hvat hon snúði seg um, framleiðsluhættir, fíggjarligar upplýsingar um verkætlanina, hvat úrslitið var og kundi brúkast til o.s.fr.

Ráðið vísti á, at nevndu upplýsingar vóru um virkisviðurskifti og vóru fevnd av § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit (lóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina). Ráðið metti, at um innlit varð latið í upplýsingarnar, var verkætlanin almenn, og onkur kundi nýta hugskot og aðrar upplýsingar til egna framleiðslu og harvið skatt marknaðarmøguleikarnar hjá A. Sambært ráðnum kundi hetta hava við sær ein týðandi fíggjarligan miss fyri A, og grundarlag var tí fyri at sýta innlit.

§ 12, stk. 1, nr. 2 § 12, stk. 1, nr. 2 og stk. 2 í innlitslógini er soljóðandi:

> "§ 12 Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um
> 1) ...
> 2) tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti.
> Stk. 2. Um bert ein partur av skjalinum kemur undir ásetingina í stk. 1, skal hann verða kunnaður við hin partin av innihaldinum í skjalinum."

Treytin fyri at undantaka upplýsingar um rakstrar- og vinnuviðurskifti er, at tað ítøkiliga verður mett, at vera stórur vandi fyri fíggjarligum missi fyri tað ella tey virki, sum upplýsingarnar viðvíkja, um innlit verður latið. Tað skal vera greitt samband millum, at innlit verður latið í upplýsingarnar og vandan fyri, at fyritøkurnar missa pening. Sambært ásetingini skal myndugleikin, t.v.s. her Fiskivinnu – og samferðslumálaráðið, meta um, hvussu ein møguligur fíggjarligur missur fer ella kann fara at vísa seg sum avleiðing av, at innlit verður latið í umbidnu upplýsingarnar.

Fiskivinnu – og samferðslumálaráðið hevur nú, eftir samskifti við A, gjørt eina ítøkiliga meting av, hvørjar fíggjarligu avleiðingarnar kunnu verða fyri felagið, um nevndu upplýsingar um

verkætlanina gerast almennar. Av hesum metir ráðið, at vandi er fyri, at onkur kann nýta hugskot og aðrar upplýsingar úr verkætlanini til egna framleiðslu og harvið skaða marknaðarmøguleikarnar hjá A. Hetta kann hava við sær ein týðandi fíggjarligan miss fyri A, og metir ráðið tí, at grundarlag er fyri at sýta innlit vísandi til §12, stk. 1 nr. 2 og stk. 2 í innlitslógini.

Eg havi ikki viðmerkingar til hesa meting hjá ráðnum og eri sostatt samd við ráðnum í, at upplýsingarnar um verkætlanina kunnu undantakast frá innliti, sambært § 12, stk. 1 nr. 2 og stk. 2 í innlitslógini.

**Upplýsing um navn á ráðgevandi persóni (advisory board)**
Umframt ikki at veita innlit í sjálva verkætlanina, hevur ráðið eisini noktað at lata upplýsing um navnið á einum persóni, sum stóð undir partinum um advisory board.

A hevði yvirfyri ráðnum upplýst, at starvsviðurskiftini hjá hesum forðaðu viðkomandi í at vera almennur í sambandi við menning av tílíkum verkætlanum, sum A arbeiddi við. Eisini hevði hesin gjørt greitt, at hann tók seg úr verkætlanini, um hansara navn gjørdist alment. Sambært A kundi verkætlanin hjá A ikki gjøgnumførast, um hesin tók seg úr verkætlanini, tí hansara vitan og førleikar vóru avgerandi fyri verkætlanina.

Á hesum grundarlagi hevði ráðið mett, at stórur vandi var fyri, at A fekk týðandi fíggjarliga miss av, at innlit varð latið í navnið. Víst varð í hesum sambandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit. Ráðið viðmerkti, at tað ikki var atlit at verju av persóninum og hansara viðurskiftum, at innlit varð sýtt í navnið.

Spurningurin var sostatt í fyrsta lagi um navnið á viðkomandi persóni kundi undantakast frá innliti við heimild í § 12, stk. 1 nr. 2. Avgerandi var í so fall, um navnið á viðkomandi kundi metast at koma undir hugtakið “rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi”, og um tað hevði stóran fíggjarligan týdning fyri felagið, at innlit ikki varð givið í navnið.

Sambært løgfrøðiligum lesnaði (Offentlighedskommissionens bet. nr. 1510/2009 s. 706-707) verða upplýsingar um handilssambond mett at koma undir hugtakið “rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi”. Í hesum føri var tað mín metan, at støðan, sum viðkomandi persónur hevði yvirfyri A, kundi javnsetast við eitt handilssamband, og at upplýsingin um navnið á viðkomandi tí eftir ítøkiligari meting av støðuni í málinum møguliga kundi sigast at verða fevnt av undantaksheimildini í § 12 stk. 1 nr. 2 og stk. 2, og at vandi var fyri fíggjarligum tapi fyri felagið.

Við tað at grundgevingin fyri ikki at geva innlit í navnið eisini var tvinnað saman við øðrum starvsviðurskiftum hjá viðkomandi og, sambært A, einum starvsklausuli hjá hesum, helt eg tó, at óvissa kundi standast um, hvørt innlit varð noktað við atliti at persóninum og hansara viðurskiftum, heldur enn at verkætlanini.

Endamálið við innlitslógini er so stórur opinleiki sum gjørligt. Persónar kunnu ikki avtala seg burturúr innliti eftir innlitslógini, og innlitslógin má umsitast í samsvari við aðra galdandi lóggávu. Tað er tí ikki uttan týdning, hvør undirliggjandi orsøkin til møguliga fíggjarliga tapið hjá fyritøkuni er.

Av tí at eg sostatt helt tað vera ivasamt at undantaka navnið frá innliti á fyriliggjandi grundarlagi, bað eg ráðið greiða nærri frá, hvørt innlit í navnið kann leiða til innlit í verkætlanina, og um innlit tí í øðrum lagi skal noktast av hesi orsøk. Viðmerkjast skal, at ráðið frammanundan hevði nevnt, at navnið á viðkomandi møguliga kundi avdúka, hvat verkætlanin innihelt, men sambært ráðnum var hetta tó ikki neyvt kannað.

Í frágreiðingini frá ráðnum til mín tann 20. desember 2024 greiddi ráðið frá, at framleiðsluhátturin v.m. í verkætlanini hjá A var so mikið serstakur og knýttur at fakligu vitanin hjá viðkomandi persóni, at navnið var at meta sum ein virkisloynidómur.

Ráðið metti, at um tað varð upplýst, at viðkomandi var partur av verkætlanini, so bar til hjá kappingarneytum at finna fram til, hvat og hvussu arbeitt varð við verkætlanini, og við hesi vitan, kundu teir væntast at brúka hana og virkishugskotið hjá A til egna framleiðslu og harvið taka part av marknaðarstøðuni hjá A og viðføra týðandi fíggjarligar avleiðingar fyri A. Samanumtikið metti ráðið tí, at grundarlag var fyri at sýta innlit í navnið hjá viðkomandi, vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit.

Eg havi ikki viðmerkingar til hesa frágreiðing frá ráðnum um, at navnið hjá ráðgevanum í hesum ítøkiliga føri má metast sum ein virkisloynidómur. Eg havi tí ikki viðmerkingar til, at ráðið á hesum grundarlagi ikki hevur latið innlit í navnið á viðkomandi persóni.

**Viðgerðartíðin**
Klagarin rør í sínum viðmerkingum uppundir, at tað loysir seg hjá aktørum í málinum at draga umbønir um innlit í langdrag, so tær kanska ikki longur eru aktuellar yvirhøvir og vísur í hesum sambandi á, at upprunaliga varð innlitsumbønin send Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum tann 24. februar 2024.

Skjølini í hesum málum vísa hesa gongd:

- Tann 24. februar 2024 KVF søkti Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið um innlit
- Tann 26. februar 2024 svaraði ráðið umbønini
- Tann 15. apríl 2024 sendi KVF kæru til ráðið um avgerðina
- Tann 17. apríl 2024 svaraði ráðið kæruni
- Tann 10. juli 2024 sendi KVF klagu til Løgtingsins umboðsmann
- Tann 27. august 2024 fráboðaði umboðsmaðurin niðurstøðu, har ráðið m.a. varð biðið um taka málið upp til nýggja viðgerð.
- Tann 4. september 2024 setti ráðið seg í samband við KVF við spurningi um innlitsumbønina
- Tann 5. september 2024 svaraði KVF ráðnum, at tey ynskja innlit í alt tað útstrikaða

- Tann 16. september 2024 sendi KVF áminning til ráðið
- Tann17. september 2024 svaraði ráðið, at tey samskifta við felag um nakrar av upplýsingunum.
- Tann 27. september 2024 ráðið kunnaði KVF um, at tey enn samskifta við felagið
- Tann 4. oktober 2024 sendi ráðið nýggja avgerð um innlit til KVF
- Tann 4. oktober 2024 sendi KVF nýggja klagu til Løgtingsins umboðsmann
- Tann 28. oktober 2024 fekk umboðsmaðurin frágreiðing og skjøl frá ráðnum
- Tann 26. november 2024 bað umboðsmaðurin ráðið lýsa part av málinum neyvari. KVF kunning.
- Tann 20. desember 2024 fekk umboðsmaðurin nærri frágreiðing frá ráðnum.

Tíðargongdin vísur, at ráðið upprunaliga svaraði innlitsumbønini innan tveir dagar, men at tað var viðgerðin av kæruni og seinni klagunum frá KVF, sum stendur fyri stórum parti av samlaðu viðgerðartíðini uppá gott 10 mánaðar.

Her skal eisini viðmerkjast, at tað gingu í fyrsta lagi 1½ mánaði frá, at ráðið, tann 26. februar 2024, svaraði KVF, til KVF sendi ráðnum kæru tann 15. apríl 2024, og at tað gingu nærum tríggir mánaðir frá, at KVF fekk kæruavgerðina frá ráðnum tann 17. apríl 2024 til KVF sendi klagu til umboðsmannin tann 10. juli 2024. Av samlaðu tíðini uppá góðar 10 mánaðir eru tað sostatt 4½ mánaðir sum skyldast viðurskiftum hjá KVF.

Sæð í mun til hetta, og at málini bæði (upprunaliga málið og uppafturtikna málið) tilsamans innihalda svar uppá innlitsumbøn, eina kæruviðgerð, uppafturtøku við hoyringum og tvær klagumálsviðgerðir, er tað mín meting, at tað er ikki grundarlag fyri at siga, at í hesum føri hava aktørar í innlitsmálinum sloppið at draga málið um innlit í langdrag.

Vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar geri eg ikki meira við klagumálið.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður